TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Hoyvíkar skúli**
**Vegurin Langi**
**FO-188 Hoyvík**

Hoyvíkar skúli hevur komandi skúlaár 452 næmingar í 1. - 7. flokki.

35 lærarar starvast í skúlanum.

Heimasíða:
www.skulin.fo/hoy/

## Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovufólki til Hoyvíkar skúla.

**Arbeiðið umfatar**
Vanligt skrivstovuarbeiði og roknskaparførslu.

**Førleikaprógv**
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er parttíðarstarv og verður sett 1. august 2005. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Birgit Arge, skúlastjóra, tlf. 31 50 73, ella Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, tlf. 30 20 10.

**Umsóknir**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. juni 2005.

- onnur leys størv?
Hyggið á
www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



Á Endurnýtsluni verður tikið ímóti burturkasti frá vinnu og privatum í Tórshavnar kommunu.

## Frítíðaravloysarar til Kommunalu Brennistøðina

Kommunala Brennistøðin sóknast eftir tveimum frítíðaravloysarum til fyrifallandi arbeiði á Brennistøðini og Endurnýtsluni á Hjalla.

Tíðarskeiðini eru ávíkavist 20. juni – 5. august og 4. juli – 19. august. Fyrimunur er við stóra koyrikortinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Bárð Michelsen, deildarleiðara, tlf. 302040.

**Umsóknir**
til størvini skulu vera Kommunalu Brennistøðini, á Hjalla, FO-188 Hoyvík í hendi í seinasta lagi hósdagin 16. juni 2005.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 267,**
P/F 17. november 1979,
110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:**
12.08.2004.
**Partapeningur:**
Lækking viðtikin 12.08.2004 við kr. 471.750,00 til kr. 1.228.250,00 til kurs 809,10, er nú endalig.
**B:** partabrøv frá kr. 1.086.500,00 til kr. 708.250,00
**C:** partabrøv frá kr. 93.500,00 til kr. 0,00

Skráseting Føroya
tann 06. juni 2005

Kristin Balle

# Til sølu

Vegna Spf. Hvalurin í konkurs lýsi eg við hesum fylgjandi bát til sølu:

**M/B »Hvalurin« SA0155, XPF 2998**

Seksæringur 31 ft., bygdur 1959 í Skopun. Nýrenoveraður. Motorurin er ein Yarnar 100 HK, 4 cyl.

Báturin hevur fiskiloyvi í bólki 5A.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22, boks 106,
110 Tórshavn
tlf. 359595 · telefax 359596
T-post: advokat@advokat.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

# Húsarhaldsskúli Føroya

## Søkir lærara (avloysara)

Søkt verður eftir einum Føðslu- og húsarhaldsfrøðingi at undirvísa fulla tíð í tíðarskeiðnum 1. august 2005 - 31. juli 2006.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
· *skal undirvísa í matgerð, kostlæru, vørukunnleika, reinføri o.ø.*
· *skal vera við til at fyriskipa ymisk tiltøk á skúlanum.*
· *dugir at samstarva*
· *er fryntligur og fyrikomandi*
· *hevur áhuga í at arbeiða saman við ungdómi*
· *hevur hug at seta sín dám á skúlan*



**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal hava útbúgving sum føðslu- og húsarhaldsfrøðingur ella líknandi útbúgving.

**Løn:**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18,1 – 27,4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Fyrispurningar:**
Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú venda tær til leiðaran á skúlanum Elisabeth Akursmørk.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og CV skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 25. juni 2005.

Sosialurin 341800

Húsarhaldsskúli Føroya er ein sjálvsognarstovnur. Stovnurin rekur skúlan sambært løgtingslóg nr 66 frá 13. mai 1992. Skúlin er ein vistarskúli og kunnu 21 næmingar ganga á skúlanum.

Húsarhaldsskúli Føroya - Stoksoyrarvegur 29 - 700 Klaksvík
tlf: 456974, 216974 fax 457664 - teldupostur: hsf@post.olivant.fo

HSF



# Bygningur til leigu ella sølu

Nú Sosialurin flytir av Argjum, verður bygningurin hervið lýstur til leigu ella sølu.

Bygningurin, sum stendur á Matr. nr 93, Argjavegur 26 á Argjum, er umleið 200 fermetrar til víddar í trimum hæddum, har tvær tær ovaru eru innrættaðar til skrivstovuhøli. Niðasta hæddin var upprunaliga innrættað til prentsmiðju, men hevur seinastu tíðina hýst einum bókavirki.

Grundøkið er 680 fermetrar til víddar. Á økinum er asfalterað parkeringspláss til 20-25 bilar.

Talan kann verða um eitt ella fleiri leigumál.

**Bygningurin verður seldur, um hóskandi boð fæst.**

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Eirik Lindenskov, stjóra, telefon 216409 ella eirikur@sosialurin.fo

Sosialurin 341800

**SP/F Húsið**